# ur møtast

– Eg havi ikki valt at syngja gospel, og eg havi heldur ikki valt at lata vera. Mær dámar bara væl góðan tónleik, og at syngja góðan tónleik, sigur unga songkvinnan.

### Fingið fleiri møguleikar

Síðani hon vann kappingina um at gerast Ársins Songrødd, hevur Anna Nygaard sungið og framført ymsastaðni. Á Eystanstevnu framførdi hon saman við bólki á Torginum, og seinni sama kvøld sang hon á Bedura í Runavík. Viku seinni, samstundis sum Fjarðastevnan var í Vestamanna, sang hon á Víkcafé í Klaksvík, har nógv fólk vóru og lurtaðu.

– Higartil havi eg fyri tað mesta sungið við playback, eins og í kappingini um Ársins Songrødd. Tí verður tað sera spenanndi at syngja á Summar Festivalinum, tí har komi eg at hava frálíkar tónleikarar aftanfyri meg. Tað ljóðar heilt sikkurt betur, tá tú hevur veruligar tónleikarar afturat tær, heldur Anna Nygaard

Hóast telefonin ikki ringir í heilum, fær unga songkvinnan nógvar fyrispurningar um at framføra, og hon merkir, at heitið sum Ársins Songrødd hevur givið henni fleiri møguleikar. Og lítið er at ivast í, at møguleikarnir verða enn fleiri eftir Summar Festivalin.

### Fylgir dreyminum

Hvat framtíðini viðvíkur, er Anna Nygaard ikki heilt vís í, hvat hon skal. Í løtuni gongur hon í studentaskúla, og har ætlar hon at gerast liðug, áðrenn hon fer víðari. Tó hevur hon ein dreym um at gerast sangarinna á høgum støði og kunna liva av tónleikinum. Og nú hon hevur vunnið Ársins Songrødd, og hevur spennandi uppgávuna á Summar Festivalinum fyri framman, ætlar hon at vita, hvussu langt hetta ber.

Eg ætli at vita, hvussu langt eg kann koma við tónleikinum. Beint nú fokuseri eg bara uppá konsertina á Summar Festivalinum, og so fái eg at síggja aftaná tað, hvat víðari fer at henda, sigur fryntliga glyvragentan, Anna Nygaard, at enda.

*Tekstur: Rógvi Nybo*
*Myndir: Jensk Kristian Vang*

